## Barca var betri

José Mourinho er ikki júst kendur fyri at vera eyðmjúkur, men í gjár ásannaði hann, at Inter hevði tapt móti einum betri liði. – Barcelona spælir við høgum trýsti, og tá teir fanga bóltin, gongur tað frameftir við fullari ferð. So tað er ikki serliga trupult at staðfesta, at Barcelona var betra liðið í dag, segði Mourinho við enska the Guardian. Hinvegin heldur hann ikki, at Inter ikki hevur møguleika at vinna kappingina. – Tað kunnu vit sjálvandi. Real Madrid, Chelsea og Barcelona halda øll, at tey eru favorittar, men sjálvandi er tað møguligt hjá okkum at vinna á teimum seinni í kappingini, sigur Mourinho.



## Rennikapping sunnudagin

Sunnudagin skipar Bragdið fyri rennikapping á Tórsbreyt. Talan er um kapping, sum fevnir um styttri og miðallongu teinarnar á rennibreytini. Kappast verður 60, 100, 200 og 1.000 metrum, og er talan um kapping, sum verður skipað fyri bæði børn og vaksin. Børn, sum eru fødd í 1998 ella seinni kunnu kappast á øllum teinum, meðan tey, sum eru eldri enn hetta, kappast á 100, 200 og 1.000 metrum. Tiltakið er opið fyri øllum, og skal tilmelding fara fram klokkan 13.30. Sjálv kappingin byrjar klokkan 14.00.

# Her reyk Liverpool

**Tað hjálpti lítið, at Liverpool vann sín dyst móti ungverska Debreceni. Sigurin hjá Fiorentina á Lyon ber við sær, at Liverpool fyri fyrstu ferð í sjey ár ikki vann seg víðari úr bólkaspælinum í Champions League**



Tá Juan Vargas við brotssparki sendi Lyon-málverjan, Hugo Lloris, skeivan veg og skoraði til sigurs fyri Fiorentina, gjørdist tað samstundis endin hjá Liverpool í ársins Champions League-kapping – hóast Liverpool vann sín dyst ímóti Debreceni

Mynd: Tony Gentile/Reuters



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Fótbóltslagið í enska stórfelagnum, Liverpool, er ikki av tí besta í løtuni.

Felagið, sum 18 ferðir hevur vunnið enska meistaraheitið, og sum fimm ferðir hevur vunnið europisku meistarakappingina, er ikki í fína selskapinum í ár.

Lagnuløtan var í gjár, og hóast Liverpool greiddi sín setning við at vinna útidystin móti Debrecen, so var hetta ikki nóg mikið. Treytin hjá Liverpool var samstundis, at Fiorentina ikki vann heimadystin móti Lyon, og tann fortreytin helt ikki. Við einum einsamøllum máli, sum Vargas skoraði upp á brotsspark, eydnaðist nevnliga Fiorentina at vinna seg víðari í kappignini.

Liverpool hevur nú trý stig upp til Lyon, men í Champions League telja innanhýsis uppgerðirnar, áðrenn roknað verður í málmuninum. Og í so máta var talan um dýra yvirtíð hjá Liverpool ímóti Lyon. Heima á Anfield stóð nevnliga 1-1 á talvuni, tá farið varð um teir 90 minuttirnar, men Lyon skoraði tá sigursmálið í yvirtíðini. Og í útidystinum var Liverpool á odda 1-0, tá klokkan segði 90, men aftur her skoraði Lyon í yvirtíðini.

### Benitez er "tryggur"

Í fótbóltsheiminum plagar tað at vera greitt tekin um ein sekk til venjaran, tá leiðslan sigur seg hava fult álit á hesum.

Er nakað um hetta, so er lítil ivi um, at Rafael Benitez skjótt er ein liðugur maður í Liverpool.

Christian Purslow, sum er stjóri í felagnum, sigur nevnliga, at tað als ikki er upp á tal at geva Benitez sekkin.

Tað eru tað annars nógv av viðhaldsfólkunum, sum fegin vilja gera. Liverpool hevur bert vunnið tveir av seinastu 11 dystunum. Liðið er ikki longur partur av fína selskapinum í Europa, og støðan í Premier League kundi bent á, at tað verður trupult at vinna seg upp í top-4, sum gevur atgongd til Champions League komandi kappingarár.

Einasta lítla plásturið á sárið er, at júst einsamalli sigurin í teimum 10 dystunum undan tí í gjárkvøldi, kom á heimavølli móti arvafíggindunum úr Manchester United.

- Tú kanst ongan tíð verja teg móti málum í seinastu løtu, og hesi hava kostað okkum dýrt í Champions League.

- Og tað ber ikki til, at reka eitt felag upp á tilvildarligar fortreytir. Benitez hevur skrivað undir fimmára langan sáttmála við okkum, og hann hevur bert verið her í fýra mánaðir av teimum fimm árunum, sigur Purslow.

Fíggjarliga er tað dyggur smeitur fyri Liverpool, at teir longu nú eru úti úr fínasta europiska selskapinum, men heldur ikki hetta tykist nervað Purslow, sum sigur, at roknskapurin fer at javnviga, um felagið stendur seg hampuliga væl í Europa-league, sum felagið nú skal taka lut í.

**Støðan í bólkaspælinum**

**Bólkur A**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Bordeaux | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 6 | 2 | 4 | 10 |
| 2 Juventus | 4 | 2 | - | 2 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 8 |
| 3 Bayern München | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 4 |
| 4 Maccabi Haifa | 4 | 0 | - | 0 | - | 4 | 0 | 6 | -6 | 0 |

**Bólkur B**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Manchester Utd. | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 7 | 4 | 3 | 10 |
| 2 Wolfsburg | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 7 | 3 | 4 | 7 |
| 3 CSKA Moskva | 4 | 1 | - | 1 | - | 2 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 4 Besiktas | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 1 | 6 | -5 | 1 |

**Bólkur C**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Real Madrid | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 11 | 6 | 5 | 7 |
| 2 AC Milan | 4 | 2 | - | 1 | - | 1 | 6 | 5 | 1 | 7 |
| 3 Marseille | 4 | 2 | - | 0 | - | 2 | 8 | 6 | 2 | 6 |
| 4 FC Zürich | 4 | 1 | - | 0 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 3 |

**Bólkur D**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 4 | 3 | - | 1 | - | 0 | 8 | 2 | 6 | 10 |
| 2 FC Porto | 4 | 3 | - | 0 | - | 1 | 5 | 2 | 3 | 9 |
| 3 Atlético Madrid | 4 | 0 | - | 2 | - | 2 | 2 | 8 | -6 | 2 |
| 4 Apoel Nicosia | 4 | 0 | - | 1 | - | 3 | 1 | 4 | -3 | 1 |

**Bólkur E**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Fiorentina | 5 | 4 | - | 0 | - | 1 | 12 | 6 | 6 | 12 |
| 2 Lyon | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 8 | 3 | 5 | 10 |
| 3 Liverpool | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 4 | 5 | -1 | 7 |
| 4 Debrecen | 5 | 0 | - | 0 | - | 5 | 5 | 15 | -10 | 0 |

**Bólkur F**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Barcelona | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 5 | 2 | 3 | 8 |
| 2 Rubin Kazan | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 4 | 5 | -1 | 6 |
| 3 Inter | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 5 | 6 | -1 | 6 |
| 4 Dynamo Kiev | 5 | 1 | - | 2 | - | 2 | 6 | 7 | -1 | 5 |

**Bólkur G**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sevilla | 5 | 3 | - | 1 | - | 1 | 10 | 4 | 6 | 10 |
| 2 Unirea Urziceni | 5 | 2 | - | 2 | - | 1 | 7 | 5 | 2 | 8 |
| 3 Stuttgart | 5 | 1 | - | 3 | - | 1 | 6 | 6 | 0 | 6 |
| 4 Rangers | 5 | 0 | - | 2 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 2 |

**Bólkur H**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Arsenal | 5 | 4 | - | 1 | - | 0 | 12 | 4 | 8 | 13 |
| 2 Olympiakos | 5 | 2 | - | 1 | - | 2 | 3 | 5 | -2 | 7 |
| 3 Standard Liege | 5 | 1 | - | 1 | - | 3 | 6 | 8 | -2 | 4 |
| 4 AZ Alkmaar | 5 | 0 | - | 3 | - | 2 | 3 | 7 | -4 | 3 |

## Champions League

### Úrslit í gjárkvøldið

**Bólkur E**

Debreceni-Liverpool 0-1 (0-1)
0-1: David N'Gog, 4.

Fiorentina-Lyon 1-0 (1-0)
1-0: Juan Vargas (brotsspark), 28.

**Bólkur F**

FC Barcelona-Inter 2-0 (2-0)
1-0: Gerard Piqué, 10.
2-0: Pedro Rodriguez, 26.

Rubin Kazan-Dinamo Kiev 0-0

**Bólkur G**

Glasgow Rangers-Stuttgart 0-2 (0-1)
0-1: Sebastian Rudy, 16.
0-2: Zdravko Kuzmanovic, 59.

Unirea Urziceni-Sevilla 1-0 (1-0)
1-0: Ivica Dragutinovic (sjálvmál), 45.

**Bólkur H**

Arsenal-Standard Liège 2-0 (2-0)
1-0: Samir Nasri, 35.
2-0: Denílson, 45.

AZ Alkmaar-Olympiakos 0-0

### Dystir í kvøld

**Bólkur A**

Bordeaux-Juventus
Bayern München-Maccabi Haifa

**Bólkur B**

CSKA Moskva-Wolfsburg
Manchester United-Besiktas

**Bólkur C**

Real Madrid-FC Zürich
AC Milan-Olympique Marseille

**Bólkur D**

FC Porto-Chelsea
Apoel Nicosia-Atletico Madrid